Fylgiskjal 5

LM-045/2023

FÆRØERNES POLITI

Dato: 10. oktober 2023
J.nr.: **5600-10167-10-23**

ANKLAGEMYNDIGHEDEN

Húsagøta 3
Postbox 3018
110 Tórshavn

Tlf. +298 351448

Løgmálaráðið

Hoyringssvar frá Føroya Politi til uppskot um broyting í revsilógini

Føroya Politi hevur fingið uppskot um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin) um kynsliga avnoyðslu og lokking til ummælis.

Føroya Politi takkar fyri høvið at gera viðmerkingar og fegnast um, at stig eru tikin til hesar dagføringarnar.

Føroya Politi hevur verið alment frammi við upplýsingum um eitt størri mál um kynsligan ágang móti børnum og ungum í Føroyum. Føroya Politi hevur í tí sambandinum gjørt vart við, at um lokking verður gjørt revsivert, so kann tað fyribyrgja álvarsligum kynsligum brotsverkum av børnum. Lokking er sera álvarsligt og kann hava stórar avleiðingar fyri tann órættaða. Tí hevur tað stóran týdning, at hesar broytingar koma við í revsilógina skjótast tilber. Tað sama er galdandi fyri broytingarnar í §§ 225 og 228 í revsilógini.

Føroya Politi hevur ongar viðmerkingar til ítøkuligu ásetingarnar í uppskotinum, men viðmælir, at fyrningarfreistin í § 94, stk. § 4 eisini verður broytt, soleiðis at § 229 um lokking eisini verður fevnd av § 94, stk. 4.

Vinarliga

Katrin T. Hansen
Høvuðsákæri